## Lazio betri til brotsspørk

Lazio vann í gjár italsku steypafinaluna í fótbólti. Í finaluni, sum varð spæld á heimavøllinum hjá Lazio í Rom, stóð annars á jøvnum eftir bæði 90 og 120 minuttir. Tí gjørdist neyðug við brotsspørkum, og her brendu Antonio Cassano og Campagnero fyri Samdoria, meðan Tommaso Rocchi var einasti spælarin, sum ikki sendi bóltin í netið fyri Lazio.



## Barcelona vann steypið

Talan gjørdist um tryggan 4-1 sigur til Barcelona, tá teir í gjár spældu sponsku steypafinaluna móti Athletico Madrid. Athletico Madrid kom tó á odda eftir bara 10 minuttum, men tann leiðslan helt ikki leingi. Barcelona javnaði fyri steðgin, og miðskeiðis í seinna hálvleiki skrædnaði av álvara. Við trimum málum upp á tíggju minuttir avgjørdu Messi & Co. dystin, soleiðis at Barcelona framvegis er á kósini at vinna bæði ligu, steypakapping og Champions League.



*Aftur hesa ferð var Víkingur við yvirlutan móti grannunum. Við heimavølli í seinnu hálvfinaluni hava víkingarnir nú tríkvartan fótin í steypafinaluni*
*savnsmynd*

ÍF-Víkingur 0-1 (0-0):

# Víkingar tættari ólavsøkuni

**Gøtumenn og leirvíkingar fóru úr Fuglafirði við teprum sigri í gjárkvøldið, og nú skal vilja illa til, um tað ikki verða teir, sum ólavsøkudag fara at spæla finalu**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Víkingur tykist hava annað beinið í steypafinaluni ólavsøkudag. 1-0 sigurin í Fuglafirði í gjárkvøldið ber ógvuliga góða útgangsstøðu við sær undan seinnu hálvfinaluni, sum verður í Sarpigerði hóskvøldið 28. mai.

Einsamalla málið skoraði Finnur Justinussen miðskeiðis í 2. hálvleiki, tá ið hann við fremra stólpa smekkaði høvdið undir bóltin, eftir at vongverjin í høgru, Sverri Jacobsen, hevði lagt innfyri.

Málið kom ikki óvæntað. Sum 2. hálvleikur leið, hevði Víkingur spælt seg til fleiri málmøguleikar. Serliga var tað eftir upplegg í høgru, har Sverri Jacobsen ofta bjóðaði seg til í álopspartinum, og har Hans Jørgen Djurhuus, sum vanliga plagar at vera í hinum borðinum, var sera ágrýtin miðvallari.

Bartal Eliasen møtti við sínum sterka høvdi ofta, tá ið bóltarnir vórðu lagdir innfyri, men Andreas Lava Olsen, sum hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í vinstru, og Finnur Justinussen, sum heilt týðuliga hevur máltevið hjá pápanum (Símun Petur), lúrdu alla tíðina, og teir kundu væl havt fingið uppaftur fleiri mál. Eina ferð vóru tveir víkingar leysir í málteignum, men tað eydnaðist verjuni at verja fyri, og eina ferð stútaði Finnur úr trimum metrum og upp um málið. Ta ferðina stóð Andreas so at siga í bíðirøð!

Tað kann vera, at gongdin bar brá av, at hetta var fyrra av tveimum hálvfinalum soleiðis at skilja, at intensiteturin onkuntíð hevur verið størri í grannauppgerðini.

Men báðir partar løgdu dent á at spæla fótbólt, og um eydnan hevði verið við heimaliðnum, so kundu teir longu í 1. hálvleiki havt lagt seg á odda. Hanus Eliasen, sum hevur verið skaðaplágaður var fremsti maður, og í 1. hálvleiki sendi hann bóltin í stólpan.

Høgni Zachariasen reikaði nógv aftanfyri hann, og sentralt var tað Alexander Jovevic, sum leingi hevur verið skaddur, ið royndi at stýra. Hann vísti seg at hava gott eyga fyri spælinum, men tað sást í 2. hálvleiki, tá ið víkingarnir vóru undirmannaðir, at dystarvenjingin ikki er heilt í toppi enn.

Tað var Atli Gregersen hjá Víkingi, sum sá reytt. Ransin Djurhuus fór í lumman eftir skorpuni, tá ið Tá ið miðverjin mitt úti á vøllinum hevði taklað aftan í frá uttan at hava havt møguleika at røkka bóltin.

Súni Olsen varð tá fluttur aftur í miðverjuna, og hóast heimaliðið síðstu løtuna royndi at trýsta, so eydnaðist tað ikki at fáa bóltin í málið aftanfyri Geza Turi. Bartal Eliasen varð fluttur fram í ÍF álopið, og tað legði eyka trýst á. Nógv av uppspælinum var í høgru, har Áki Petersen og Nenad Saric vóru fadrar til nógv innlegg. ÍF hevði bóltin á stólpanum, og ta einu ferðina bjargaði Víkingur á strikuni.

Men tað eydnaðist ikki ÍF at skjóta mál, og við 1-0 sigri á útivølli í hálvfinaluni kunnu víkingar so smátt fara at fyrireika seg til ólavsøkufótbólt. Men fuglfirðingar, sum munnu iðra seg um, at teir ikki kendu sína vitjunartíð fyrra partin av 1. hálvleiki, eiga nýggja roynd um tvær vikur.

## FAKTA

**LØGMANSSTEYPIÐ**

1. hálvfinala
ÍF-Víkingur 0-1 (0-0)
**0-1:** Finnur Justinussen 67
**Dómari:** Ransin Djurhuus
**ÍF:** Andras Gango – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Fritleif í Lambanum – Nenad Saric, Frank Poulsen (Jan Ellingsgaard, 55.), Alexander Jovevic, Høgni Zachariasen, Andy Olsen – Hanus Eliasen (Viggo Johannesen, 80.)
**Gult kort:** Frank Poulsen, Áki Petersen, Alexander Jovevic
**Víkingur:** Geza Turi – Sverri Jacobsen, Niclas Niclasen, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen – Hans Jørgen Djurhuus (Martin Olsen, 81.), Sam Jacobsen, Súni Olsen, Sølvi Vatnhamar, Andreas Lava Olsen (Símun Louis Jacobsen, 81.) – Finnur Justinussen
Gult kort: Andreas Lava Olsen, Sverri Jacobsen
**Reytt kort:** Atli Gregersen 59.

# Framvegis púra opið

**ÍF venjarin hevur ikki mist mótið um finalupláss, og Víkinga venjarin undirstrikar staðiliga, at tað framvegis er langur vegur, áðrenn finaluplássið er tryggjað**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
joannes@sosialurin.fo

Jógvan Martin Olsen var sjálvandi fegin um, at tað hevði eydnast hansara monnum at vinna 1-0 á útivølli í 1. hálvfinaluni. Hann harmaðist um, at Andreas Lava Olsen eftir gult kort verður leikbannaður í seinnu hálvfinaluni, men samstundis fegnaðist hann um avrikið, sum hansara menn høvdu víst:

- ÍF hevði tikið fyrstu løtuna, men so fótaðu vit okkum, og tað var ikki fyrrenn síðsta korterið, at tað aftur rættuliga verður trýst á okkum. Tað eri eg sera væl nøgdur við, serliga tá ið havt verður í huga, at vit, eisini eftir at vit høvdu mist Atla, spældu okkum til góðar møguleikar.

Og nú eru tit nærri finaluni?

- Hesin sigurin verður sjálvandi góður at hava í viðførinum til seinnu hálvfinaluna, men tað er avgerandi, at vit eru tilvitaðir um, at tað framvegis er langt á mál. ÍF spældi seg til fleiri góðar møguleikar, og teir kundu gott havt skorað. Enn er alt framvegis púra opið, undirstrikar Víkinga venjarin.

Jón Simonsen, venjari hjá ÍF, helt, at hugburðurin hevði verið góður, men hann harmaðist um, at tað ikki hevði eydnast hansara monnum at skjóta mál:

- Um vit skulu røkka finaluni, so mugu vit skjóta mál í Gøtu, og tí eru tað møguleikar fyri. Leikliga stóðu vit avgjørt ikki aftanfyri teir, og vit spældu okkum til 3-4 upplagdar møguleikar. Men vit høvdu ikki marginalirnar við okkum. Tað mugu vit vóna verður betri á útivølli. Vit rokna framvegis við, at tað skal bera til.